


# HEVUR RA

**JAVNLEIKUR**

*Í farnu viku fekk ÍF javnað í allar seinastu sekundunum ímóti EB/Streymi. Tað skal kortini meiri til enn javnleikir, um ein skal gera seg galdandi í toppinum í Vodafone-deildini. Her stríðist Fritleif í Lambanum ímóti einum EB/Streymara*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Ættarlið á ferð

Í sínum drúgva lívi sum "fótbóltsmamma" hevur Hildigarð ferðast nógv runt um landið við ÍF'arunum.

– Eg havi møtt nógvum fólkum á hesum túrunum og vit hava nógv minnir. Og so má ein sjálvandi ikki gloyma, at vit eru saman sum familja í hesum prosjektinum, sigur hon við brosi á kinn.

Hóast hennara dreingir nú er vaksnir, er tað framvegis so, at nógv fólk brúka nógva tíð at ferðast saman við fótbóltsfeløgunum kring landið.

– Hetta hava verið sera góð ár. Nú er hugaligt at síggja, at ommurnar fylgja við ommubørnum sínum. Jú, tað er stuttligt, at tær framvegis vilja fylgja við, sigur Hildigarð.

## Alt fór upp at geila

Dagin fyri samrøðuni við Hildigarð Eliasen hevði ÍF spælt heimadyst ímóti EB/Streymi. Meðan spælarar, áskoðarar og onnur hugsa meiri um spæl og dyst, so hevur Hildigarð havt nógvar ymiskar uppgávur frammanundan dystinum. Summar síggjast. Summar síggjast ikki. Ein teirra sum sæst - og sum merkist - er kaffisølan.

Út á seinnapartin vóru hon og onnur longu farin undir at gera klárt til sølu av kaffi og køkum undir dystinum. Tær matgera í skúlakøkinum. Klokkan 4 fór fyrsta kannan útá.

– Aftaná skal alt ruddast av, tí skúlin skal brúka køkin dagin eftir. So eg var faktist ikki við hús aftur, fyrrenn klokkan gekk til 10.

Men hvat ger tað, tá man fær javnleik ímóti einum av góðu liðunum í deildini. Tað gjørdi heldur ikki støðuna verri, at javnandi málið varð skotið í allarseinastu sekundunum av dystinum.

– Tá fór alt um at geila og rópa. Tað var fantastiskt.